

# IA HÓAST EITT PUSS











## Fakta

Teir, sum manna bátastevnunevndina undir VÍF, Vestmanna Ítróttarfelag, eru: Eyðun Leo, Jónfinn Egilsnes og Bárður Nielsen.

Bátastevna verður aftur í Vestmanna 21. mai 2011.

Jónfinn Egilsnes sigur, at tiltakið við Trøllapæturi, Ommuni og lítla barninum, sum var í ítróttarhøllini í Vestmanna fríggjakvøldið, eydnaðist stak væl, og eini 700 fólk, bæði børn og vaksin, vóru í høllini hetta kvøldið.

- Hetta var eitt frálíkt tiltak, sum saman við sangi hjá Steintóri Rasmussen riggaði so avbera væl, sigur hann.

Stóra tiltakið leygarkvøldið var dansurin í ítróttarhøllini, har vestmannabólkarnir, Thunderbirds og Vestmenn, spældu til dans.

– Ítróttarhøllin var fullsett, og meiri kunnu vit ikki forlanga. Eini 800-1000 fólk tilsamans vóru í dansinum hetta kvøldið.

Jónfinn Egilsnes sigur, at kanska vóru ikki so nógv fólk at síggja í bygdini leygarkvøldið, sum okkurt annað ár, men hetta komst ivaleyst av, at veðrið var skiftandi við grovum ælaveðri og friskum vindi, tá ælini gingu.

– Fólk hava hildið seg við bátarnar, í húsvognunum, í tjaldinum – og ikki minst í dansinum í ítróttarhøllini, tá dansurin læt upp og helt fram alla náttina.

### Suppa og búffar

Hann vísir á, at eftir at bátarnir vóru komnir til bryggju seinnapartin leygardagin, og bjóðað varð til feska suppu í tjaldinum, var tjaldið, sum er 36 metrar langt og 12 metrar breitt, á tremur við fólki.

– Vit mettu, at eini 1400 fólk tilsamans fingu suppu í tjaldinum, og seinni um dagin og um kvøldið vórðu millum 500 og 600 búffar seldir, umframt at søla eisini var av breyði.

Jónfinn Egilsnes sigur, at onnur tiltøk vóru eisini í Vestmanna leygardagin og leygarkvøldið, og eitt nú var dansur á Bryggjuni bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

– Vit hava bara fingið góðar afturmeldingar, og tá fólk eru væl nøgd við okkara tiltak, eru vit tað sjálvandi eisini. Alt gekk væl, og tað eru vit sera fegin um.

Hann sigur, at bátastevnunevndin saman við vestmenningum annars gleða seg til stevnuna aftur komandi ár, sum tá verður hin tíggjunda í røðini.

– Bátastevnan er vorðin eitt stórt og fjølbroytt tiltak, sum vit nú síggja fram til á hvørjum ári, sigur Jónfinn Egilsnes í bátastevnunevndini hjá Vestmanna Ítróttarfelag.

*vilmund@sosialurin.fo*